# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*- Brádliga fór brúgvin undan mær. Tað ljóðaði, sum tá onkur missir okkurt á gólvið*

*(bilførari í Minneapolis)*

# Fleiri rivur vóru í brúnni

**Minst níggju fólk doyðu, og næstan 20 eru ikki komin afturíaftur, eftir at ein motorvegbrúgv um Mississippi-ánna datt niður í gjárkvøldið**



*Fleiri persónbilar og lastbilar duttu niður av brúnni, tá hon brotnaði*

POLFOTO

Fólk vóru júst á veg til hús frá arbeiði, og tí vóru nógvir bilar á brúnni, tá hon brádliga fór av um tvøran og datt niður í ánna.

- Hon brotnaði bara. Eg hoyrdi ikki eitt kis. Hon hvarv bara undan mær, sigur tann 28 ára gamli Louis Rogers við CNN. Hann var júst komin á brúnna, tá hon fór, men var so heppin, at bilur hansara steðgaði hálvan annan metur frá tí ytsta kantinum.

- Tað ljóðaði, sum tá onkur missir okkurt á gólvið, men so sá eg fleiri bilar detta niður av brúnni, og skjótt var nógvur roykur. Men eg var heppin, segði ein annar bilførari við tíðindastovurnar.

Klokkan var júst farin av seks lokala tíð, tá tann áttabreytaða motorvegbrúgvin fór tvørturav og datt niður í ánna. Brúgvin var í býnum Minneapolis í statinum Minnesota, og dagliga koyrdu umleið 200.000 bilar eftir henni. Vegbreytin var umleið 20 metrar oman fyri ánna, og brúgvin var 140 metrar long.

Amerikonsku myndugleikarnir vóru skjótir at boða frá, at talan var ikki um eina yvirgangsatsókn, men teir siga seg ikki duga at siga, hví tann 40 ára gamla brúgvin datt niður. Fleiri amerikanskir fjølmiðlar hava síðani vanlukkuna sagt og skrivað, at fyri einum ári síðani avdúkaði ein eftirlitskanning, at fleiri rivur vóru í brúnni. Nú vanlukkan hendi, vóru menn í ferð við at leggja nýtt asfalt á brúnna, og tí vóru onkrar koyribreytir stongdar, tá vanlukkan hendi.



*Í dag vóru 20 fólk framvegis ikki komin afturíaftur eftir vanlukkuna*

Reuters

## Undir illgruna fyri 62 morð

**Russisku myndugleikarnir hava illgruna um, at ein maður hevur beint fyri 62 fólkum**

Russisku fjølmiðlarnir hava gjørt nógv burtur úr einari røð av morðum í og nærhendis Bitsevskij-lundini í Moskva, og nú bendir nógv á, at sami maður myrdi øll.

Í juni í fjør tók løgreglan í Moskva ein 32 ára gamlan mann, og undir avhoyringunum viðgekk maðurin, at hann hevði lagt ætlanir um at myrða 64 fólk - eitt fyri hvønn puntin á einum talvborði.

Løgreglan hevði tó ilt við at trúgva manninum, tí tá vóru "bara" 14 lík funnin í og við Bitsevskij-lundina, men nú sigur løgreglan seg hava upplýsingar, sum kunnu seta tann 32 ára gamla í samband við 62 morð, skrivar Itar-Tass.

## STUTT SAGT

### Uttan Hamas

Í Ísrael hevur amerikanski uttanríkisráðharrin, Condoleezza Rice, fingið greitt at vita, at Hamas sleppur ikki upp í part, um Ísrael skal gera eina samstarvsavtalu við teir palestinsku sjálvsstýrismyndugleikarnar. Boðini fekk hon frá Ehud Olmert, forsætisráðharra. Á fundinum teirra millum segði Olmert eisini, at Ísrael er sinnað at taka seg aftur av Vestara Áarbakka, um landið kann fáa trygd fyri, at teir palestinsku myndugleikarnir har kunnu tryggja frið.

### Vitni horvin

Trý fólk, sum skuldu avhoyrast sum vitni í býarrættinum í Keypmannahavn, eru ikki at finna, skrivar B.T. Tey trý skuldu vitna í einum máli, har ákæruvaldið hevur ákært ein 51 ára gamlan mann av pakistonskum uppruna fyri at hava beint fyri 37 ára gomlu konu síni, tá tey vóru og vitjaðu í Pakistan í 1998. Tey trý vitnini komu við flogfari úr Pakistan seinasta leygardag saman við tveimum donskum løgreglumonnum. Men tá løgreglan vildu hava samband við tey sunnudagin, vóru tey farin av hotellinum, og enn eru tey ikki komin afturíaftur.

### Fýlist á Meksiko

Amnesty International fýlist á, at myndugleikarnir í Meksiko gera ov lítið fyri at revsa teir, sum stóðu fyri teirri sera harðrendu frámferðini ímóti teirri politisku andstøðuni í seksti- og sjeytiárunum. Millum annað er fyrrverandi forsetin Luis Echeverria ongantíð skuldsettur, hóast illgruni eru um, at hann gav boð um at skjóta fleiri studentar í 1968.